# Mistu fiskiloyvini í eina viku



**Tað loysti seg hjá Vesturvarða og Vesturskin at fara í rættin við avgerðini hjá Fiskiveiðieftirlitinum at taka fiskiloyvini frá teimum í tvær vikur. Føroya rættur lækkaði revsingina til eina viku**

ÓLÓGLIGUR FISKISKAPUR
*Randi Jacobsen*
*randi@sosialurin.fo*

Vesturvarði og Vesturskin eru nú leysir av revsingini, sum teir fingu fyri at hava trolað ólógliga á eini stongdari leið á Fugloyarbanka.

Fríggjadagin seinnapartin kom dómarin við úrskurðinum.

Rætturin staðfesti avgerðina hjá Fiskiveiðieftirlitinum at taka fiskiloyvini frá trolarunum, men rætturin helt tað vera ov nóg, at teir skuldu missa loyvini í tvær vikur. Ein vika var nóg mikið.

Frammanundan hevði reiðaríið goldið bøturnar og fyri virði av veiðu og reiðskapi.

Tá ið málið var fyri í Føroya rætti, kom sakførarin hjá reiðarínum við, at Stelkur og Bakur eisini høvdu verið í sama kassa, men teir sluppu við ávaring.

Til tað segði dómarin í úrskurði sínum, at skipararnir á Vesturvarði og Vesturvarða høvdu verið meira óansnir. Tann viðmerkingin hekk saman við, at teir vóru ikki líka óvitandi, sum skipararnir á Stelki og Baki um, at kassin varð stongdur nakrar dagar frammanundan. Tá ið Tjaldrið ringdi umborð á Vesturskin, segði stýrimaðurin á Vesturskin sambært Tjaldrinum, at hann visti um stongda økið. Og hin skiparin hevði biðið um at fáa Kunngerðablaðið faksað umborð, men hann hevði bara ikki lisið kunngerðina.

# Almenn bjálving skal stimbra byggivinnuna

**- Tað var fyri at økja um virksemi í byggivnnuni og fyri at seta gongd á orkusparandi tiltøk, at 15 milliónir krónur vórðu settar av á løgtingsfíggjarlógini til endamálið**

POLITIKKUR
*Eirikur Lindenskov*
*eirikur@sosialurin.fo*

Hetta sigur Eyðgunn Samuelsen, løgtingskvinna, sum hevur sett Anniku Olsen, landsstýriskvinnu ein munnligan fyrispurning viðvíkjandi bjálving av almennum bygningum.

Eyðgunn Samuelsen spyr, um landsstýriskvinnan kann greiða frá, hvussu nógvur peningur er nýttur higartil í ár av játtanini á 15 milliónur krónur til bjálving av almennum bygningum. Hon vil eisini hava at vita, hvussu nógv av nýtta peninginum er farið til kanningar, og hvussu nógv er farið til bjálving, hvørjir bygningar eru ela verða bjálvaðir av hesi játtan í ár. Hon spyr eisini, um landsstýriskvinnan væntar, at játtanin verður brúkt í ár?

Eyðgunn Samuelsen grundgevur spurningin við, at fyri at økja um virksemi í byggivinnuni og fyri samstundis at seta gongd á orkusparandi tiltøk, serliga innan bygging, varð avrátt at seta 15 milliónur krónur av á løgtingsfíggjarlógini til hetta endamál í 2009.

- Peningurin var settur av undir innlendismálum, og játtanin løgd til Landsverk at umsita. Dentur var lagdur á, at henda játtan skuldi vera við til at økja virksemi innan byggivinnuna, og at hetta virksemið skuldi so vítt gjørligt spjaðast kring landið, sigur Eyðgunn Samuelsen.

Hon vísir á, at semja var um, at almennir bygningar skuldu kannast, og at nakrir almennir bygningar síðan skuldu veljast út, har farast skuldi í gongd við at bjálva ella fremja onnur orkusparandi tiltøk.

- Í hesum sambandi var eisini játtanin til størri viðlíkahald av almennum bygningum savnað saman og hækkað 10 milliónir krónur. Hetta fyri at fáa sett meira ferð á viðlíkahald av almennum bygningum og bjálving samstundis, sigur Eyðgunn Samuelsen.




**NISSAN PATHFINDER 2.5 TD VØR.** 6 mánaða garanti

**Skrásetingarnr:** UE 385 **Km:** 34.000
**Árgangur:** mars 2007
**Útgjald:** 53.500 **Mðr. gjald:** 3.327 (5 ár)
**kr. 214.000,-**



**TOYOTA COROLLA 1.6 TERRA H/B** 6 mánaða garanti

**Skrásetingarnr:** HU 377 **Km:** 29.000
**Árgangur:** mai 2005
**Útgjald:** 34.500 **Mðr. gjald:** 2.167 (5 ár)
**kr. 138.000,-**



**TOYOTA COROLLA 1.4 SEDAN** 6 mánaða garanti

**Skrásetingarnr:** SL 776 **Km:** 15.000
**Árgangur:** februar 2008
**Útgjald:** 43.000 **Mðr. gjald:** 2.682 (5 ár)
**kr. 172.000,-**



**FORD MUSTANG 4.6 V8** 6 mánaða garanti

**Skrásetingarnr:** RD 801 **Km:** 7.500
**Árgangur:** mai 2008
**Útgjald:** 103.750 **Mðr. gjald:** 6.361 (5 ár)
**kr. 415.000,-**



**TOYOTA AVENSIS 2.0 SOL AUT** 6 mánaða garanti

**Skrásetingarnr:** DJ 672 **Km:** 24.000
**Árgangur:** juli. 2005
**Útgjald:** 46.250 **Mðr. gjald:** 2.868 (5 ár)
**kr. 185.000,-**



**BMW 316 TI** 6 mánaða garanti

**Skrásetingarnr:** DN 339 **Km:** 44.000
**Árgangur:** sept. 2001
**Útgjald:** 24.500 **Mðr. gjald:** 2.425 (3 ár)
**kr. 98.000,-**



**NISSAN ALMERA 1.8 SEDAN** 6 mánaða garanti

**Skrásetingarnr:** FN 799 **Km:** 93.000
**Árgangur:** juli 2003
**Útgjald:** 24.500 **Mðr. gjald:** 2.425 (3 ár)
**kr. 98.000,-**



**TOYOTA RAV4 2.0 D-4D DIESEL** 6 mánaða garanti

**Skrásetingarnr:** VS 984 **Km:** 135.000
**Árgangur:** apríl 2002
**Útgjald:** 34.500 **Mðr. gjald:** 3.356 (3 ár)
**kr. 138.000,-**



**NISSAN KING CAB 2.5 DIESEL** 6 mánaða garanti

**Skrásetingarnr:** LU 544 **Km:** 40.000
**Árgangur:** nov. 2006
**Útgjald:** 54.000 **Mðr. gjald:** 3.333 (5 ár)
**kr. 215.000,-**



**OPEL ZAFIRA 1.8 – 7 SETUR** 6 mánaða garanti

**Skrásetingarnr:** EP 855 **Km:** 105.000
**Árgangur:** mars 2003
**Útgjald:** 26.250 **Mðr. gjald:** 2.578 (3 ár)
**kr. 105.000,-**

6 mánaða garanti

**Vit bjóða nú 6 mánaða garanti uppá bilar, ið kosta meira enn 85.000,-**
Garanti skipan, ið hevur eina sjálvsábyrgd uppá kr. 500,-, fevnir um allar knappliga íkomnar feilir, ið eyðsæð ikki skyldast nýtslu brúkarans, rust, uttanífrákomnir skaðar ella væntandi tænastueftirlit.
Eingin gandur og eingir smáir bókstavir.
**Kom og vitja okkum – landsins fremstu bilasølu.**

Brúktir bilar við **lagaligari fígging**

**REYNI SERVICE** P/F
Vegurin Langi · Hoyvík · Tel 353040 · Fax 353041
Við Borðoyavík · Klaksvík · Tel 473040 · Fax 473041
T-postur: rs@reyniservice.fo · www.reyniservice.fo